# Upsastøddin broyttist við svartkjaftaveiðini

**– Eg haldi tað vera best fyri allar partar, at vit fáa haldgóð prógv fyri, um stóru svartkjaftatrolararnir í veruleikanum fiska tann stóra upsan, sum annars er burtur í veiðini hjá partrolarunum, sigur skipari, sum hevur fiskað undir Føroyum í mong ár**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Vit hava eingi prógv, men undrunarvert er tað, at upsaveiðan undir Føroyum broyttist so nógv, tá ið vit fingu teir stóru og effektivu svartkjaftatrolarar, sigur gamal upsaskipari. Myndin er tilvildarliga vald*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Ein stívliga seksti ára gamal skipari, sum hevur roynt undir Føroyum seinastu hálvt hundrað árini, ringdi av fiskileið til Sosialin í gjáramorgunin. Hann eggjaði blaðnum at leggja upp til alment kjak um, hvør orsøkin er til, at upsin, sum partrolararnir fáa, hevur verið smærri og smærri seinastu átta árini. Skiparin helt, at um tað er so, at stóri upsin endar í trolinum hjá stóru svartkjaftatrolarunum, hevði tað verið best fyri allar partar, um hesin trupulleikin varð loystur.

## Eingi prógv

– Sum er, hava vit eingi prógv fyri hesum. Men eg havi verið saman við monnum, ið hava verið á svartkjaftaveiði undir Føroyum. Hesir siga, at stór íblanding stundum kann vera av upsa og toski, tá ið roynt verður á ávísum leiðum, eitt nú norðanfyri og eystanfyri.

Skiparin heldur ikki, at teir, sum eru við stóru svartkjaftatrolarunum, høvdu mist nakað sum helst, um sannleikin kom á borðið.

– Hesi skip liva jú av tí, sum í fyrsta lagi svartkjafturin, sildin og makrelurin geva. Er upsi og toskur uppi í veiðini, er tað kortini bert viðfáningur í mun til tær velduga stóru nøgdirnar, sum hesi skipini føra til lands gjøgnum árið.

Hann heldur, at ein neyv kanning av svartkjaftafiskiskapinum eisini hevði styrkt okkara støðu mótvegis øðrum tjóðum, sum fiska svartkjaft undir Føroyum.

– Okkum nýtist prógvini, áðrenn tað ber til at gera nakað við henda trupulleika, leggur hann dent á.

Skiparin sigur, at tá ið tað er prógvað, um hesir stóru trolarar fiska tann stóra upsan og partvís toskin, eiga myndugleikarnir at krevja, at ryst verður sett í trolið hjá hesum skipum, soleiðis at tann stóri fiskurin sleppur útaftur – og ikki verður tikin.

– Tað kann væl ikki vera so torført at finna út av, um illgrunin hjá okkum, sum fiska upsa undir Føroyum, er rættur.

## Veiðan broytt

Hann vísir á, at upsaveiðan undir Føroyum er nógv broytt, síðan tann nógva svartkjaftaveiðan tók seg upp, og skipini bæði gjørdust størri, betri og nógv effektivari.

– Vit hava tvey sløg av upsa; summarupsa, sum er smáur og gýtingarupsa, sum er stórur. Summarupsin gongur uppi í reyðæti og smádjórum, meðan tann stóri fiskurin gongur uppi í svartkjafti, sild og øðrum fiski.

Sjálvur hevur upsaskiparin verið á sildaveiði í sínari tíð, og tá var ikki óvanligt, at teir lógu við snellu og fiskaðu sær nakrar yvirvaksnar upsar ella toskar til døgurða.

– Eg haldi, at støðan við upsafiskiskapinum undir Føroyum og harvið eisini við virkisliðnum á landi nú er so álvarsom, at myndugleikarnir noyðast at gera nakað við hetta. Tað er eingin orsøk til, at nakar missir nakað við, at hesi viðurskifti verða løgd undir sjóneyku. Heldur er tað so, at allir partar kunnu fáa meira burtur úr – og somuleiðis betri samvitsku, um uppíblandingin er so stór, sum vit stúra fyri, at hon í veruleikanum er.

Jú, sigur skiparin. – Her er okkurt á vási, sum ikki hevur verið fyrr, um vit fara eini átta ár aftur í tíðina.

– Tað er so nógvur upsi at fáa, sum ongantíð áður, men eingi prógv eru fyri, hvar tann stóri fiskurin er – og hvar hann endar. Hinvegin er greitt, at hann er onkustaðni. Tað kann væl ikki bera til, at tá ið nøgdin av upsa í havinum er so stór, at so lítið av stórum fiski er at fáa.

## Tænir best

Skiparin vísir á, at tað er ikki langt síðan, at íslendingar noyddust at steingja leiðir í íslendskum sjógvi, tí uppíblandingin av upsa og toski í veiðini hjá svartkjaftatrolarunum var so stór.

– Eg haldi, at vit eiga at fáa prógvini á borðið og halda okkum til sannleikan. Á tann hátt koma vit longst, og hetta kemur í longdini at tæna okkum øllum best.

Hann heldur, at tað skal vera undarligt, um ikki eitt hvørt samband er millum munandi broyttu upsaveiðina hjá partrolarunum og nýggju, stóru og effektivu svartkjaftatrolararnar, sum vit hava í føroyskum sjógvi ein stóran part av árinum.

– Veiðimynstrið broyttist fullkomiliga við stóru svartkjaftaveiðini, sigur hann og heldur fram:

– Eg stúri fyri, at tann stóri upsin kemur ikki inn á grunnin sum vanligt um heystarnar og várarnar, tí hann verður tikin í teimum stóru svartkjaftatrolunum, har hann gongur uppi í svartkjaftinum og sildini, sigur skiparin at enda.

Náttúran er fantastisk:

# Tá eingin stórur fiskur er gýtir tann smái

**– Støddin á gýtingarupsa er farin úr 70-75 cm. fyri nøkrum árum síðan niður í 55 cm. Tann smái fiskurin, sum slett ikki átti at verið gýtingarførur, hevur stór og góð rogn, sigur upsaskipari**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Náttúran goymir nógv loyndarmál, sum munnu vera torfør at greiða út í æsir. Vit kenna tað úr havinum – og vit kenna tað úr bakkanum, har fuglurin reiðrast. Er lítið at eta við landið, og smá útlit eru til, at fuglaungin kemur undan, er kent millum fuglamenn, at ikki allur lundin verpur í senn, men strekkir verpingina yvir eitt longri tíðarskeið. Soleiðis kanst tú eitt vánaligt lundaár síggja stórar pisur og smáar pisur hvørt um annað. Og kanska komu tær flestu pisurnar undan – júst tí, at ikki alt varp í senn og skuldi ambætast í senn.

## Smáur gýtingarfiskur

Upsaskipari, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur, at fyri einum átta árum síðan var vanligt, at gýtingarupsin var eini 70-75 cm. til støddar. Í dag fæst lítið og einki av hesum fiski og upsin, sum partrolararnir fáa, er fyri tað mesta upsi 3 og upsi 4. Hetta er smáur fiskur. Hendinga stórur upsi er uppi í veiðini hjá skipunum, men gongdin seinastu árini hevur verið hon, at fiskurin er vorðin smærri og smærri. Einaferð í fjør heyst var bati at síggja í støddini, men aftur í vár hevur tann nógva veiðan verið rættiliga smáur upsi.

Men eisini fiskurin í havinum dugir at "innrætta" seg eftir umstøðunum. Og gjørdi hann ikki tað, var eingin upsastovnur eftir.

Skiparin sigur, at nú vártíð er, og fiskurin gýtir, er vanligt, at upsi, sum liggur um 55 cm., ber stór og góð rogn.

– Eftir "røttum" skuldi hesin fiskurin ikki verið gýtingarførur – og als ikki verið grundarlagið undir komandi "upsa-ættarliði". Men soleiðis er náttúran nú einaferð háttað, at tá ið tann stóri fiskurin er burtur av gýtingarleiðunum, gýtir tann smái fiskurin í staðin. Soleiðis er mynstrið broytt seinastu árini.

## Upsavinnan í vanda

Skiparin sigur seg stúra fyri hesi gongd, bæði tá ið ræður um vinnuna á sjógvi og landi.

– Nú eri eg so gamalur, at eg neyvan sigli í meira enn eitt ella tvey ár aftrat. Hinvegin hugsi eg um teir, sum skulu bera arvin víðari og liva av tí, sum havið gevur. Tí mæli eg staðiliga okkara myndugleikum til at taka henda trupulleikan upp beinanvegin, soleiðis at finnast kann fram til ítøkiligu orsøkina til broytta gongdina og broytta veiðimynstrið, sigur skiparin.